StÍF-Stjørnan 16-22 (8-9):

# Stjørnan ridlaði

**Tað var ikki fyrr enn seinastu 20 minuttirnar at Stjørnan tryggjaði sær sigurin móti einum væl kempandi StÍF liðið**

HONDBÓLTUR, KVINNUR
*Jákup Mørk*



*Anna Maria Berthelsen var ógvuliga sentral í miðverjuni hjá StÍF, har m.a. Una Olsen hevði sera torført við at fóta sær*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var botnur móti toppi á Skála sunnudagin, og sum so mundi eingin ivast í, at talan fór at verða um ein hampuligan lættan dyst hjá Stjørnuni, sum í vetur bert hevur mist stig ta einu ferðina. Í Vestmanna móti føroyameistarunum.

Kanska roknaðu klaksvíksgenturnar eisini sjálvar við, at stigini fyri dystin fóru mest sum at koma av sær sjálvum, tí í fyrra hálvleiki var lítið og einki, sum bendi á, at sigurin skuldi gerast so ómaksleysur.

### Javnt í fyrra

StÍF legði nógv fyri beint sum dysturin byrjaði. Við mansverju syrgdu tær fyri, at leikluturin hjá Simonu Dziugyte ikki skuldi gerast eins stórur og vanligt, og tá eingin av hinum leikarunum á stjørnuliðnum kundi gera nakað serligt til tess at økja um leikferðina, so gekk so toluliga væl hjá heimaliðnum at halda álopsspælinum úr Klaksvík í skák. At so Ingun Mørkøre í málinum eisini stóð seg sera væl, og ikki minst tók sær av hópin av gjøgnumbrotum frá vengrunum báðum, gjørdi ikki støðuna verri.

Á álopsspælinum royndi heimaliðið eisini at nýta umhugsni, soleiðis at ferðina ikki varð sett ov langt upp, men at tær ístaðin spældu bóltin runt fyri at bíða eftir, nær okkurt holið kom í verjuna. Ofta riggaði hetta eisini væl, soleiðs at tá Stjørnan gjørdist óansin fekk onkur á heimaliðnum smoygt sær innum.

Soleiðis gekst heldur javnt allan fyrra hálvleik, og hóast venjarin hjá gestunum royndi at vekja sínar leikarar við einum time-out, so batnaði einki. StÍF hekk framvegis í, og at Stjørnan førdi við einum máli, tá farið varð til hálvleiks, var eingin ábending um, at tær nú vóru ávegis einum sigri.

### Skjótálopini avgjørdu

Í seinna hálvleiki skuldi ein kanska hildið, at nú máttu gestirnir vakna, men fyrstu løtuna sást einki til hetta. Ístaðin var tað nú aftur StÍF, sum legði seg á odda, men langt um leingi kom spakuliga ferð á Stjørnuliðið.

Fyrst og fremst var broytingin, at tær fingu skil á verjuspælið. Una Olsen, sum langt ífrá var sannførandi inni á strikuni, varð skift við Beintu Klakstein, og tá Stjørnan samstundis fekk forða Alinu Oraru at bróta ígjøgnum, gjørdist alt meira trupult hjá heimaliðnum at skora. Hetta viðførdi so eisini, at kontraálop kundu setast ígongd, og hetta var nakað, sum hóvaði Annu Kristinu Samson. Av teimum átta seinastu málunum hjá Stjørnuni átti Anna Kristina tey seks, og tað sigur ikki so lítið um leiklut hennara hendan seinasta partin av dystinum.

### Ætla sær uppeftir

Hóast dysturin soleiðis endaði við einum hampuliga tryggum sigri til Stjørnuna, so var hetta tó eisini ein áminning um, at eingin sigur kemur av sær sjálvum.

Hinvegin prógvaði hetta eisini, at tær hjá StÍF eru til reiðar at taka av, um ein møguleiki brádliga stingur seg upp, tá spælt verður móti liðum, sum liggja ovarligari á stigatalvuni. Hetta kundi bent á, at StÍF ætlar sær annað og meira enn leiklutin sum stiggevari hetta kappingarárið, og eftir sera laku byrjanina, sum liðið fekk upp á árið, skal tað als ikki takast sum givið, at liðið noyðist eina deild niður at leika komandi veturin.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Stjørnan 16-22 (8-9)**
Málskjúttar:
StÍF: Ileana Manolescu 5, Anna Maria Berthelsen 3, Alina Olaru 3, Anna Berg 2, Guðrun Ólavsdóttir 2, Sunfríð B. Jacobsen 1
Stjørnan: Anna Kristina Samson 8, Simona Dziugyte 7(2), Andrijana Milodanovic 3, Joan M. Joensen 2, Beinta Klakstein 2
Brotskøst: StÍF 1, Stjørnan 2
Útvísingar: StÍF 1, Stjørnan 2
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen. Gjørdi ikki nakað hóvasták burtur úr einum løttum dysti.

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 70 | (14) |
| Gabriella Fekete | VB | 67 | (18) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 58 | (5) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 42 | (14) |
| Ioana Rápa | VÍF | 41 | (8) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 39 | (19) |
| Birita Wardum | Neistin | 34 | (2) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 32 | |
| Nicoleta Radu | VÍF | 30 | |
| Ileana Manulescu | StÍF | 29 | (2) |
| Súnfríð B. Jacobsen | StÍF | 28 | (12) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 27 | (2) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 26 | (1) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 25 | |
| Sóleyð Mikkelsen | VÍF | 25 | (1) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ingi Olsen | VÍF | 42 | (6) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 40 | (5) |
| Finnur Hansson | H71 | 39 | (13) |
| Sámal Joensen | VÍF | 38 | (5) |
| Heini Joensen | Neistin | 38 | (10) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 38 | (11) |
| Bjarni Wardum | H71 | 35 | (11) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 33 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 32 | |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 32 | (14) |
| Høgni Klein | Kyndil | 31 | (2) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 28 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 25 | (4) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 25 | (5) |
| Iljan Topic | KÍF | 24 | |

## Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 185 | 110 | 75 | 12 |
| 2 | Stjørnan | 6 | 5 - 0 - 1 | 171 | 130 | 41 | 10 |
| 3 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 145 | 123 | 22 | 8 |
| 4 | VB | 6 | 3 - 0 - 3 | 142 | 146 | -4 | 6 |
| 5 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 137 | 171 | -34 | 2 |
| 6 | Sóljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 127 | 170 | -43 | 2 |
| 7 | StÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 109 | 166 | -57 | 2 |

## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 5 - 1 - 0 | 179 | 140 | 39 | 11 |
| 2 | Neistin | 6 | 5 - 1 - 0 | 167 | 151 | 16 | 11 |
| 3 | StÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 159 | 156 | 3 | 6 |
| 4 | H71 | 6 | 3 - 0 - 3 | 162 | 165 | -3 | 6 |
| 5 | Tjaldur | 6 | 1 - 1 - 4 | 142 | 155 | -13 | 3 |
| 6 | KÍF | 6 | 1 - 1 - 4 | 147 | 170 | -23 | 3 |
| 7 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 140 | 159 | -19 | 2 |



**FÓLKATINGSVALIÐ 2001**

# Tey brekaðu



**Eivind Jacobsen**
*Strendur*

Samfelagið letur í dag fyritíðarpensjón til nógv fólk, sum hava ymisk brek. Hesi fólk kunnu ikki arbeiða eins og tey, sum eingi brek hava. Men tey kunnu nakað. Samfelagið loysur trupulleikan hjá teimum við at geva teimum pengar. Sjálvandi skal hetta framhaldandi verða møguligt. Eisini byggja vit stovnar, fyri at tey skulu hava okkurt at fara til. Hesir stovnar eru góðir. Umframt hesar skipanir átti eisini at verið møguligt hjá nevndu fólkum at arbeitt á jøvnum fóti við øll onnur.

Í dag kunnu tey tjena uml. Tkr. 40 áðrenn tað ávirkar veitingina frá tí almenna. Í dag forðar lógin fyri at fólk við smærri brekum kunnu tjena eina vanliga inntøku. Tað átti at verið møguligt at virkir og almennir stovnar settu fólk í starv sum høvdu brek. Í dag hava virkir ikki ráð at seta fólk í starv sum hava smærri brek. Tey skuldu fingið løn, sum svaraði til starvið. Almannaverkið kundi síðan endurgoldið arbeiðsgevarum tað sum arbeiðsevnini hjá starvsfólkinum var niðursett orsaka av brekinum.

Hetta er vinningur fyri øll. Samfelagið hevði spart útreiðslur til stovnar. Framleiðslan í landinum hevði verið munandi størri. Tann brekaði kundi á jøvnum fóti við øll onnur arbeitt. Eisini hevði hann fingið møguleika at vinna sær líka stóra inntøku, sum øll onnur og at liva júst sum øll onnur.

Hetta hevði bøtt munandi um lívsvirðið hjá teimum brekaðu. Tá høvdu tey ikki sæð seg sjálvan sum eina byrðu fyri onnur, eins og nógv av teimum gera í dag. Tað hevur nógv stórri týdning enn fíggjarligu fyrimunirnir.

# Útspillingin frá Tjóðveldisflokkinum av øllum føroyingum, sum ikki taka undir við teirra politikki

**Finnleif Guttesen**
*Fólkatingsvalevni hjá sambandsflokkinum*



At Tjóðveldisflokkurin skal verða einasta frælsa føroysaka røddin á fólkatingi, er at niðurgera allar aðrar føroyingar, sum ikki taka undir við teirra politikki.

At umboð uttanfyri Tjóðveldisflokkin ikki kunnu skapa virðing og gerast ein virðilig fræls føroysk rødd á fólkatingi, er ein útspilling av øllum føroyingum.

Bert at vilja umboða loysingarflokkarnar og ikki alt føroya fólk á fólkatingi, er ein niðurgering av øllum føroyingum.

At siga, at øll sum ikki velja loysingarflokkarnar eru undirbrotlig og uttan sjálvsvirðing, er útspilling av øllum føroyingum.

Hendan útspillingin og vanvirðingin av føroyingum frá Tjóðveldisflokkinum kann bert verða eitt tekin uppá undirlutakenslur, tí tað er bert loysingarflokkarnir, sum tosa um, at føroyingar eru undirbrotligir og uttan sjálvsvirðing.

Um umboð vi omanfyri nevndu hugburði verður valt á Fólkating, so kann ikki vantast nógv gott til gagns fyri Føroyar og føroyingar.

# Trygdareiður Jóannesar

**Sjúrður Skaale**



Trygdareiður Jóannesar Eidesgaards til donsku sosialdemokratarnar hevur staðið sterkari enn hansara lyfti til føroysku veljararnar

"Valkvøldið í marts 1998 stóð á jøvnum millum teir borgarligu og stjórnina hjá Nyrup. 89-89. Við tí seinasta mandatinum, tí nr. 90, boðaði eg frá, at eg ikki fór at fella eina danska javnaðarstjórn, og tískil fekk hon ikki ein meiriluta ímóti sær og kundi halda áfram".

Soleiðis skrivar Jóannes Eidesgaard í Sosialinum hósdagin. Henda "fráboðan" var sum ein treytaleysur trygdareiður. Hon gav donsku stjórnini fríar teymar. Hon gjørdi millum mangt annað, at stjórnin púra trygg kundi seta landsstýri og løgting (eisini Føroya Javnaðarflokk) til viks tá tey kravdu, at føroyskt skuldi viðurkennast sum tjóðarmál Føroya.

Sat nakar annar føroyingar við tí 90. mandatinum, hevði hann sagt stopp. Her til og ikki longur. Men ikki Jóannes Eidesgaard. Hann stóð við sín trygdareið til teir donsku sosialdemokratarnar.

Jóannes hevur ikki hevur verið formligur limur í tí sosialdemokratiska tingbólkinum. Men partur av donskum partapolitikki hevur hann verið. Trygdareiðurin til sosialdemokratarnir hevur staðið sum høgdur í klett.

Trygdareiðurin hevur verið sterkari enn lyftið til teir føroysku veljararnar um, at Jóannes skuldi vera ein sjálvstøðug føroysk rødd á fólkatingi.

# Úlvur í seyðaskinni

**Heðin Jørgensen**
*Sørvágur 6. nov. 2001*

Las grein og viðmerking í Sosialinum í dag.

Greinin snúði seg um, hvussu væl nøgdir Fólkafloksmenn eru um samstarvið við Tjóðveldisflokkin, og hvussu fegnir teir vilja, at hetta samstarv heldur fram í minst fýra ár aftrat.

Hví man tað vera so? Hví eru fólkafloksmenn so glaðir fyri at samstarva við Tjóðveldisflokkin? Áttu Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ikki at verið idealogist á hvør sínum spori?

Jú! Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin vóru einaferð tveir ólíkir flokkar. Fólkaflokkurin høgrasinnaður, við nøkrum limum, ið vildu meiri á sjálvstýrisleið, menn, sum tó svermaðu mest fyri høgrapolitikki floksins. Ímeðan Tjóðveldisflokkurin var ein vinstraorienteraður flokkur, sum vildi væl meir á sjálvstýrisleið, enn flest aðrir flokkar.

Tjóðveldisflokkurin er broyttur, so tað passar høgraorienterðaða Fólkaflokkinum sum fótur í hosu. Frá at vera ein vinstraorienterðaður loysingarflokkur, er Tjóðveldisflokkurin blivin ein loysingarflokkur burtur av. Einasta mál floksins er at fáa ríkisfelagsskapin Danmarkar og Føroya ímillum upploystan, ongantíð ov skjótt.

Hetta er tað, sum hóvar tí nógv minni loysingarsinnaða Fólkaflokkinum so væl. Samstarvið millum hesar flokkar merkir, at sjálvstýrismálið koyrir við eini ferð, sum hóvar Fólkaflokkinum, meðan tann minni hóvligi Tjóðveldisflokkurin, orsakað av alt ov lítlari undirtøku frá fólkinum fyri sínum víðgongdu ætlaðum, berjist við pannuni ímóti múrinum.

Fólkafloksmenn hava verið snildir. Meðan henda støðan hevur staðið uppá, hava hørgraekstremistar sum hr. Djúrholm, Breckmann, Petersen og seinni Niclasen hóreiggja sær, og lættliga fingið sjónarmið síni um tildømis privatiseringar av almennum ognum og 10 ára skiftistíð fyri fiskiloyvi á dagsskrá, eins og teir hava steðgað solialdemokratisku ætlaðunum við samhaldsfesti føroyinga.

Jóhann Mortensen, sigur í viðmerking, at einasta rætta hjá føroyskum ungdómi at gera, er at velja ein moderniseraðan Tjóðveldisflokk við Høgna Hoydal á Fólkating.

Góðu Føroyingar, ung eins og gomul, at velja Fólkaflokkin ella Tjóðveldisflokkin, sum hann nú er vorðin, er eitt og tað sama, nevniliga at styðja Fólkaflokshugsjónir. Høgni Hoydal og Tjóðveldisflokkurin er ein úlvur í seyðaskinni.

Í hugaheimi mínum síggi eg ein Tjóðveldisflokk, ið líkist meiri tí gamla, ein flokk, sum saman við Javnaðarflokkinum kann taka skilagóð stig á sjálvstýrisleið, men sum eisini kann arbeiða fyri vælferð føroyinga. Eg tori bara ikki at trúgva hesum, og ætli aftur hesuferð at velja Javnaðarflokkin.

Gott val!

**Fólkatingsvalið 2001**

# Lat ta føroysku røddina – sambandsrøddina – umboða teg á fólkatingi

**Johan Dahl**



Tað verður nú frá Tjóðveldismonnum fokuserað nógv uppá, at FØROYSKA røddin skal umboða føroyska fólkið á fólkatingið,- og har skulu teir náa tað sum teir ikki hava verið førir fyri tey seinastu 4 árini í samgongu, - nevniliga at fáa breiðar semjur við danir.

Nei, góðu føringar, latið tykkum ikki villeiða av hesum monnum, tí alt tað teir higartil hava víst í verkið er so langt burtur frá tí sum fólkið vil , og tann demokratiska rættin at latað fólkið talað í maj,- hann tordu teir heldur ikki at geva okkum .

Hví kunnu vit so spyrja okkum sjálvi???

Svarið er sera einfalt, - nevniliga tað at Føroyska fólkið vildi ikki tað sum teir vildu, - teir ræddust úrslitið!!!

Fólkatingsvalið hesaferð verður ikki einans spurningurin um at fáa Føroysku røddina, - SAMBANDSRØDDINA valda inn á fólkating, og harvið verða við til at byggja land - men eisini eitt val har vit sum veljarar mugu vísa loysingarflokkunum hvar vit standa í forhold til Ríkisfelagskapin við Danmark og Grønland .

Áheitan mín til Ung sum Eldri er: Verið við til at tryggja framtíð tykkara,- fari á val 20 . novembur og seti krossin við eitt av umboðum SAMBANDSFLOKSINS, vit tæna tykkum best.